# gur fremstur í røðini





*Stórur áhugi var fyri valfundinum í Runavík í gjárkvøldið. Nógv fólk lýddu á, hvat valevnini halda um verkætlanina við tunli millum Skálafjørðin og Suðurstreymoy*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Djurholm mong høggini fyri ikki at hava syrgt fyri, at samráðingarnar við P/F Skálafjarðartunnilin vóru komnar longri, nú løgtingsval varð útskrivað.

Bill Justinussen helt fyri, at fløkja var komin í tíðarperspektivið hjá landsstýrismanninum og harmaðist um, at málið var komið í dra.

- Eg vóni, at vit nú fáa eitt politiskt skifti í Føroyum, og málið um Skálafjarðartunnilin verður tað fyrsta, sum Miðflokkurin fer at senda av bakkastokki, segði løgtingsmaðurin.

Alfred Olsen segði, at hann altíð hevur tikið undir við hesi verkætlan, bæði tí, at hon byggir á tað privata grundarlagið og tí, at tað eru fólk úr økinum hjá honum, sum stóðu – og standa – aftanfyri hesa ætlan.

- Eftir 20-25 árum verður tunnilin givin sum gáva til almennu Føroyar.

Hann vísti á fyrimunir, sum tunnilin hevur við sær – við størri trygd á vegnum, minni vegasliti, minkandi oljunýtslu, minni útláti og tíðarsparing hjá tí einstaka.

Tórbjørn Jacobsen helt, at ein undirsjóvartunnil millum Eysturoy og Suðurstreym er skilabesta íløgan í undirstøðukervið í Føroyum.

Hann vísti á ta veldugu synergi, sum henda íløga fer at skapa, bæði vinnuliga, handilsliga og í aðrar mátar.

- Vit mælti til, at arbeiðið varð boðið út, so marknaðarkreftirnar kundu ráða fyri, hvør fær til uppgávu at fremja hesa ætlan. Eg ivist tó onga løtu í, at P/F Skálafjarðartunnilin hevði havt góðar møguleikar at fingið hesa verkætlan, segði Tórbjørn Jacobsen.

## Nógvir spurningar

Bjarni Djurholm vísti á, at hann í hesum máli hevur verið noyddur at halda seg til "jarðiska veruleikan", sum hann tók til.

Hann greiddi frá gongdini í málinum og segði, at landsstýrismaðurin hevur havt nógvar spurningar at taka hædd fyri og taka støðu til.

- Vit hava havt einar tríggjar fundir við P/F Skálafjarðartunnilin, men náddu tíverri ikki at koma á mál í hesum umfari.

Landsstýrismaðurin vísti á, at kanska verður neyðugt hjá landsstýrinum at útvega sær serfrøðihjálpina úr Sveits ella London, tí hendan helst ikki finst í Danmark.

- Vit høvdu vónað at fáa peningin til serfrøðihjálpina í oktober, men hetta eydnaðist tíverri ikki, segði Bjarni Djurholm, sum annars dugdi rímiliga væl at grundgeva fyri, hví málið ikki var komið longri.

Hann vissaði tó um, at hann í allar mátar brennur fyri Skálafjarðartunlinum.

Kári P. Højgaard vísti á, at summi mál ganga skjótt, meðan onnur ganga seint.

- Tað veldst eisini um viljan, og eg haldi ikki, at landsstýrismaðurin hevur gjørt nóg mikið fyri at fáa hesar pengarnar til serfrøðihjálpina.

Sjálvur er Kári í fíggjarnevnd løgtingsins, og hann vísti á fundinum á, at honum kunnugt var einki til hindurs fyri hjá landsstýrismanninum at fáa umbida peningin.

- Eg skilji ikki, at hetta mál skal vera so kompliserað, sum Bjarni Djurholm hevur gjørt tað til, segði løgtingsmaðurin.




## Tekur avgerðir

Heðin Mortensen helt fyri, at verkætlanin við undirsjóvartunli millum Eysturoy og Suðurstreymoy er heilt einastandandi, sum hann tók til.

- Hetta samband kemur at hava nógvar fyrimunir við sær, bæði vinnuliga, handilsliga, á tænastuøkinum og við arbeiðsmegi millum økini.

Heðin legði annars dent á, at nógv skal gerast í Havnini fyri at kunna taka ímóti allari ferðsluni, sum nýggja meginæðrin úr Suðurstreymoy og norður til Klaksvíkar kemur at merkja.

- Eg taki fult undir við hesi verkætlan, segði hann og helt fyri, at her er ov nógv tosað, men ov lítið gjørt.

Bill Justinussen helt fyri, at tað er slíkum monnum, sum Heðini Mortensen, ið føroyskur politikkur hevur brúk fyri, tí borgarstjórin í Havn tekur avgerðir.

- Kanska eru ikki allar avgerðirnar rættar, men so rættar hann tær bara, legði løgtingsmaðurin hjá Miðflokkinum aftrat.